# Fjølbroytt skjalaframsýning

**Ein framsýning hjá Føroya Landsskjalasavni við heitinum Kelduvað hevur í hesum døgum verið í Müllers Pakkhúsi í Havn. – Grundin til, at vit gera hesa framsýningina er, at vit vilja vísa fólki, at Landsskjalasavnið goymir annað enn fólk halda vit hava, sigur John Kjær, skjalavørður**

FRAMSÝNING
*Ingrid Bjarnastein*

Seinasta vikuskifti lat upp ein spennandi og fjølbroytt skjalaframsýning í Müllers Pakkhúsi í Havn. Framsýningin, sum hevur fingið heitið Kelduvað, hevur opið til 2. hvítusunnudag.

– Tað eru nógv, sum ikki vita, hvat Landsskjalasavnið er fyri nakað. Og tað er orsøkin til at vit hava gjørt hesa framsýningina. Fólk skulu sleppa at síggja, at Landsskjalasavnið goymir nógv annað enn fólk halda.

Hetta sigur John Kjær, skjalavørður.

– Framsýningin umfatar bara ein evarska lítlan part av tí, sum vit hava. Vit hava tikið nøkur evni upp. Tey eru ættarsøga, politisk søga, hugtakið kærleiki, frítíð og felagsskapur, vinnusøga og Tórshavn, greiðir John Kjær frá.

## Væl vitjað

Um hálvthundrað fólk hava verið og vitjað framsýningina um dagin, og metir Landsskjalasavnið, at hetta er eitt gott úrslit. Hósdagin vóru um 100 vitjanir, og er tað serstakliga gott.

Nógv spennandi tilfar er at síggja á framsýningini. Millum annað eru privat kærleiksbrøv, sum ein maður hevur skrivað til ta gentuna, sum hann 14 ár seinni varð giftur við.

Harumframt eru uppskot til nýggj løgtingshús, ein lítil lesistova, har fólk kunnu koma. Hon er mest ætlað fólki, ið fáast við ættargransking. Tvey ættargranskingarfeløg eru í Føroyum. Ættarbandið og KT-slekt. Tey eru eisini við á framsýningini.

– Tað var ógvuliga torført at finna útav, hvat vit skuldu velja burturúr. Tí valdu vit at fara í nøkur evni. Hetta er bara ein evarska lítil partur av tí, sum Landsskjalasavnið goymir, sigur John Kjær, sum vísir á, at skjalasavnið hevur umleið 3,5 kilometrar av skjølum, og runt roknað gevur hetta eini 16 milliónir skjøl.

– Alt hetta er sjálvsagt leingi at koma ígjøgnum. Men vit hava nógv annað enn bara skjøl. Millum annað er ein vimpil, frá løgtinginum áðrenn Merkið kom, sum hevur hingið á flaggstongini hjá teimum, greiðir skjalavørðurin frá.

Tankin aftanfyri hesa framsýning kemur frá í fjør av. Tá hevði Landsskjalasavnið ikki minni enn tríggjar rundar »føðingardagar«, men lá ikki fyri at skipa fyri nøkrum tá.

Tá vóru tað 70 ár síðani fyrsta Landsskjalasavnið var bygt, 50 ár síðani fyrsta lógin um Landsskjalasavnið var skrivað og 10 ár síðani verðandi lóg kom í gildi.

John Kjær dylir ikki fyri, at tað kann væl vera, at ein líknandi framsýning verður aftur. Og tá verður henda framsýningin helst nýtt sum grundarlag.

Í november verður nakað, sum verður kallað »Arkivernes dag«, og har verður skjalasavnið eisini við. Tá verður farið djúpari inn í evnið frítíð.



*Føroya Landsskjalasavn hevur í hesum døgum spennandi framsýning í Müllers Pakkhúsi. Framsýningin við heitinum Kelduvað, vísir ein evarska lítlan brøkpart av tí, sum Landsskjalasavnið goymir*

*Mynd: Finnur Justinussen*

# Spennandi konsertir á eystanstevnu

**Eystanstevnan í ár verður vikuskiftið 14. og 15. juni. Tað eru tey ymsu feløgini í Runavík, sum skipa fyri, og aftur í ár er nógv spennandi á skránni. Millum annað verða tvær spennandi útikonsertir. Onnur fyri børn og hin fyri vaksin**

STEVNA
*Ingrid Bjarnastein*

**Runavík:** Næsta vikuskiftið liggur eystanstevnan fyri durum. Í ár er stevnan ikki ein FM-stevna, men hetta nervar ikki fyrireikararnar, tí teir arbeiða av øllum alvi fyri at fáa eina so góða stevnu sum gjørligt.

Stevnan byrjar sum vant fríggjadag og vera tvær stórar konsertir á skránni.

Onnur er ein barna- og ungdómskonsert og hin er ein rock/popp-konsert. Báðar konsertirnar verða í grótbrotinum uttanfyri matvøruhandilin Brotið í Saltangará.

## Prix-vinnarar

Tað er Mentanarhúsfelagið, sum skipar fyri konsertunum báðum. Sami pallur á 36 tons, sum varð brúktur í fjør, verður brúktur.

Klokkan 19 verður barna- og ungdómskonsertin á skránni. Fleiri skulu á pallin, og harímillum er Brandur Enni, sum er vorðin til eina rættiliga ungdómsstjørnu her í Føroyum, og sum nú eisini er byrjaður so smátt í grannalondum okkara.

Harumframt verður Arnfríð Lützen, sum vit kenna millum annað frá Kulum Rótum, og ársins songrødd.

Eisini verða »Vit eru glað« við. Vit eru glað hava givið eina fløgu út við andaligum barnasangum.

Harumframt koma Trøllapætur og omman eisini at vitja. Hetta er fyrsta ferðin hjá teimum flestu at upptraðka í Runavík. Brandur Enni, Trøllapætur og omman hava ongantíð verið í Runavík og framført fyrr, so tað skuldi verið spennandi hjá fjepparunum.

Rock/popp-konsertin verður klokkan 23. Tá verða tríggir bólkar á palli. Prix Føroyar vinnararnir, Gestir úr Gøtu, koma til grannabýin at framføra á eystanstevnu. Harumframt sleppur gospelbólkurin, Braquet, eisini á pall á heimavølli. Triðja orkestrið er All That Rain. All That Rain man vera ein tann virknasti bólkurin í Føroyum, og sleppa runavíkingar og stevnugestir fyri fyrstu ferð at síggja teir við nýggja forsangaranum Pól Arna Holm.

Um veðrið ikki er til vildar, so verður konsertin flutt í ítróttarhøllina í Runavík.

– Tað eru tey ymsu feløgini í Runavík, sum skipa fyri stevnuni. Kunningarstovan samskipar stevnuna, og tað gjørdi hon fyri fyrstu ferð í fjør, og tað eydnaðist væl, sigur Kenneth Rasmussen í Mentanarhúsnevndini.

Umframt konsertinar, so verður eystanstevnukabarettin aftur í ár. Hon var fyri fyrstu ferð á skránni í fjør.

– Tilfar hevur verið savnað saman í eitt ár, og hesuferð hava vit fingið ein leikstjóra at samskipa kabarettina. Í fjør væntaði man onki, tí tað var fyrsta ferðin kabarettin var á skránni, men kabarettin var útseld í fjør.

Eisini verður ein kvøldseta í ítróttarhøllini í Runavík. Eisini Mentanarhúsfelagið skipar fyri hesum, og nógv spennandi verður á skránni. Hilmar Jan Hansen og Robert McBirnie skipa fyri skemtinum. Stjørna í eitt kvøld, sum tónleikabreytin í Runavíkar skúla hevur skipað fyri, verður eisini á skránni.

– Stjørna í eitt kvøld var framført tvær ferðir fyri stuttum, og tað vísti seg, at nógv høvdu hug at síggja tiltakið, men fingu ikki pláss. Tað fáa tey so høvi til nú, sigur Kenneth Rasmussen.

Sjálvandi verður eisini nógv annað á skránni á eystanstevnu, og vit vóna at frætta eitt sindur meira um tað í næstu viku.



*Prix Føroyar vinnarnarnir, Gestir, skulu framføra á útikonsert í Grótbrotinum í Runavík. All That Rain og Braquet fara eisini á pallin*

*Savnsmynd*



*Tey ungu og børnini sleppa eisini upp í part. Trøllapætur og omman fara á pall, umframt Brand Enni, Arnfríð Lützen og Vit eru glað*

*Savnsmynd*



# Tøma bingjuplássini fyrst

**Kommunalu bingjuplássini verða tømd fyrst. So kunnu fólk koma aftur har við teimum ruskposum, sum standa fullir, nú verkfallið er av. Í næstu viku fer ruskinnsavningin aftur at vera komin í rættlag, siga tey hjá IRF á Hagaleiti**

RUSKSINNAVNAN
*Edvard Joensen*

IRF fer ikki at fáa trupulleikar av ruskinum, sum hevur hópað seg upp undir verkfallinum. Longu tá næsta vika er av, vænta tey at vera komin upp undan aftur við brenningini.

Jógvan Júst Olsen, á brennistøðini hjá IRF í Leirvík, sigur, at har vænta tey ongar trupulleikar, nú ruskið fer at koma inn aftur í stórum. Móttøkan er tóm, so til ber at taka tað, sum kemur, og farið verður undir at brenna beinanveg. Bilarnir savna inn frá kommunalu bingjuplássunum nú beinanveg, og so fara teir undir vanliga innsavnan í næstu viku.

Jógvan Júst Olsen greiðir frá, at tey fyrst av øllum fara eftir tí, fólk hava lagt inn á kommunalu bingjuplássini. Tá tær bingjurnar eru tiknar, verða nýggjar settar aftur, og so kunnu fólk koma har um vikuskiftið og sleppa av við teir húsarhaldsposarnar, tey hava standandi. Tað lættir heilt væl um hjá teimum, sum savna inn. Síðan fer skipanin aftur at virka sum vanligt í næstu viku. Og fríggjadagin, roknar hann við, eru tey longu komin aftur í vanligu, føstu skipanina.

Umframt bingjuplássini verður eisini nú beinanveg tikið í móti ruski frá handlum og virkjum, sum hava havt avfall standandi. Tað verið seg vanligt matrusk og papp. Pappið, sum vanliga er buntað, verður koyrt til endurvinning, og restin fer í brenniovnin.

Hvítu posarnir við reinum pappíri frá húsarhaldinum, fara at standa til næstu regluligu rundu, sigur hann. Teir tola best at bíða.

Annars letur hann væl at reinførinum hjá fólki yvirhøvur.

– Fólk leggja ikki í, at tða luktar heima hjá teimum sjálvum, so tey binda væl um posarnar. Av tí sama er tað eisini nossligt, sum kemur á støðina. Onkur hendinga maðkur er at síggja, men tað er lítið, letur Jógvan Júst Olsen at.

Hann sigur, at meginøkið helst longu skuldi verið avgreitt í fyrstu rundu fríggjadagin. Eisini varð skipað fyri at fáa skip til útoyggjarnar eftir ruskinum, sum har var.

Hóast verkfall hevur verið, hava maskinmenninir hjá IRF verið til arbeiðis. Teir hava nýtt tíðina, einki rusk hevur verið savnað, til at reinsa og umvæla á støðini. Ovnurin er reinsaður og var púra klárur at tendra aftur fríggjadagin, sigur Jógvan Júst Olsen. Brent fer at verða um hvítusunnuna fyri at lætta um aftur í næstu viku.

– Tað eru bara húsarhaldsposar, sum koma í fyrsta umfari, og tað er ringt brenni, so tað fer helst at ganga eitt sindur seinni enn vanligt at byrja við, sigur hann. Men longu um miðja næstu viku fer annað ivaleyst eisini at vera í rúgvuni. Slíkt sum timbur og plastikk, sum er gott brennievni. Og so fer at ganga skjótari undan.

Eisini hjá KOB á Sandvíkahjalla siga tey frá, at tað sær hampiligt út. Jóhan av Reyni, sum vit tosaðu við frígjamorgunin, sigur, at støðin hevur verið opin alla tíðina, verkfall hevur verið, og nógv fólk eru komin við egnum ruski. So rúgvan verður væntandi ikki so ógvuslig, nú farið verður undir regluligu innsavningina aftur.



*Ruskrúgvan verður brend, so hvørt hon kemur á brennistøðirnar. Eingin trupulleiki fer at standast av, at nógv rusk kemur inn í senn, nú verkfallið er av, siga tey av brennistøðunum*

*Mynd: Edvard Joensen*


zarepta

ZAREPTA LEGURNAR 2003

Ætlanin er, um Gud vil, at byrja summarlegurnar í ár sunnudagin 29. juni.
Nær, tær ymisku legurnar vera, sæst á tekningarseðlinum

*Seinasta freist:*
Tekningin til barna- og ungdómslegurnar má vera okkum í hendi í seinasta lagi fríggjadagin 13. juni.

*Tekningarseðilin:*
Fyll seðilin út og send hann til:
Zarepta-legurnar
FO-385 Vatnsoyrar

| Lið | Fornavn | Eftirnavn | Føðingardagur | Kr. |
|---|---|---|---|---|
| ❒ Lið 1: 29. juni-05. juli 16-17 ár | | | / | 575,- |
| ❒ Lið 1: 29.juni-05. juli 16-17 ár | | | / | 575,- |
| ❒ Lið 2: 06. juli-12. juli 14-15 ár | | | / | 575,- |
| ❒ Lið 2: 06. juli-12. juli 14-15 ár | | | / | 575,- |
| ❒ Lið 3: 13. juli-19. juli 13 ár | | | / | 525,- |
| ❒ Lið 3: 13. juli-19. juli 13 ár | | | / | 525,- |
| ❒ Lið 4: 20. juli-26. juli 12 ár | | | / | 525,- |
| ❒ Lið 4: 20. juli-26. juli 12 ár | | | / | 525,- |
| ❒ Lið 5: 27. juli-02. aug. 11 ár | | | / | 525,- |
| ❒ Lið 5: 27. juli-02. aug. 11 ár | | | / | 525,- |
| ❒ Lið 6: 03. aug.-08. aug. 10 ár | | | / | 425,- |
| ❒ Lið 6: 03. aug.-08. aug. 10 ár | | | / | 425,- |
| ❒ Lið 7: 10. aug.-15. aug. 9 ár | | | / | 425,- |
| ❒ Lið 7: 10. aug.-15. aug. 9 ár | | | / | 425,- |

Post. nr. | Bygd / Býur

Tel.